

*Høgni Reistrup og hinir í Lawetz høvdu eina frálíka framførslu í Prixnum leygarkvøldið.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Lawetz hugsar seg um

**Framtíðin hjá unga havnabólkinum er ikki vís, men avrikið í Prixnum gevur teimum hug til at halda fram**

LAWETZ
*Eyðun Klakstein*

Eitt av stjørnuskotunum í Prixnum hesaferð hevur verið bólkurin Lawetz, sum er mannaður við ungum tónleikarum úr Havn.

Tey spæla frískan og funkutan popptónleik, og tað gjørdu teir sera væl í hálvfinaluni leygarkvøldið. Teir komu ikki víðari, men vóru sera væl nøgdir við sína framførslu, og tá ið teir høvdu vant seg við tankan um, at teir ikki komu í finaluna, var lagið gott.

– Vit spældu okkara bestu og vóru væl nøgdir við framførsluna. Vit hava fingið sera nógv burtur úr at verða við í Prixnum, og leygarkvøldið fingu vit eisini nógv góð orð við á vegnum, sigur Dávur Juul Magnussen, sum spælir trombone í bólkinum.

– Tað hevur verið sera trupult hjá dómarunum at døma leygarkvøldið, tí bólkarnar vóru allir góðir á sín hátt. Mær dámdi sera væl Gestir, men fleiri av bólkunum kundu saktans komið í finaluna, heldur hann.

### Framtíðin opin

Lawetz er nýggjur bólkur. Teir hava bara spælt saman í eitt hálvt ár, og framtíðin hjá bólkinum er ikki vís.

Orsøkin er, at trummuspælarin býr í Danmark og roynir at koma inn á tónleikaskúla, sum skal fyrireika hann til upptøkuna á konservatorii seinni.

– Framførslan leygarkvøldið gevur okkum rættiliga hug til at halda fram við bólkinum, men vit vita ikki enn, hvussu tað verður. Spurningurin er eisini, hvussu tað verður við trummuspælaranum, um vit skulu halda fram, sigur Dávur Juul Magnussen.

Lawetz er ein av teimum bólkunum, sum ikki hevur spælt til nakra konsert ímillum innleiðandi umfarið og hálvfinaluna, og teir hava onga framførslu á skránni næstu tíðina.

Tí ber til at siga, at tað er óvist, hvussu framtíðin hjá evnaríka bólkinum verður.

# Gestir vórðu bodnir í finaluna

**Eysturoyarbólkur dróg longsta streingin í hálvfinaluni í Prixnum, og teir verða nú gestir í finaluni. Seinasta innleiðandi umfarið var merkt av fjølbroyttum og góðum framførslum, har tað var sera trupult at kjósa ein greiðan vinnara**

HÁLVFINALAN
*Eyðun Klakstein*



*Gestir spæla væl saman, og teir hava ein framúrskarandi frontfigur í Ólavi Hansen. Hann er erligur og inniligur, og har er einki pátikið tvætl. Hann er, sum hann er, og that's it. Tað gevur Gestum stórt tónleikaligt trúvirði, og innihaldið í tónleikinum er dygdargott og flýtur omaná, tá ið verðin druknar.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað vóru fimm bólkar við ymiskum dygdum, sum spældu um seinasta finaluplássið í Prix Føroyum.

Tónleikastílurin var fjølbroyttur, framførslurnar somuleiðis, og styrkirnar hjá bólkunum vóru ymiskar.

Tí var tað trupult hjá dómarunum at viga ímillum, hvørjar dygdir skuldu telja mest, og hvør skuldu fáa seinasta finaluplássið.

Skuldi tað verða teir vælspælandi rocktónleikararnir í Fluffy Toys, sum spæla klassiskan rock. Skuldi tað vera teir sveimandi Gestir, sum hava eitt serligt ljóð og royna nakað nýtt. Skuldi tað vera elitutónleikararnir í Headache Blues Treo við sínum blues-rocki. Hvat við teimum ágangandi og lívligu Mind´s Eye. Ella skuldi tað vera góði og svingandi popptónleikurin hjá Lawetz, sum varð sendur í finaluna?

Spurningarnir vóru nógvir, og teir kundu ivaleyst verið svaraðir á ymiskan hátt, alt eftir hvør varð spurdur.

Allir bólkarnir, sum spældu leygarkvøldið, høvdu eyðsýntar styrkir, og tað bar eisini til at peika á manglar hjá teimum øllum. Tí var dømingin eitt slíkt kvøld trupult, og tað var meira enn tann eini bólkurin, sum kundi lagt nakað afturat finaluni í apríl mánaði.

### Fastir gestir

Men tann bólkurin, sum endaði eina akkord framman fyri hinar bólkarnar, var Gestir, og orsøkirnar til tað vóru ivaleyst fleiri. Talan er um ein bólk, sum spælir eitt øðrvísi slag av rocktónleiki, tá ið hugsað verður um føroyskan tónleik.

Teir leita eftir nýggjum ljóðum og stemningum, og teir sveima rættiliga við sínum eymu og mjúku tónum. Teir skiltu seg burtur úr rúgvuni, og tað er gott at gera í eini kapping.

Gestir spæla væl saman, og teir hava ein framúrskarandi frontfigur í Ólavi Hansen. Hann er erligur og inniligur, og har er einki pátikið tvætl. Hann er, sum hann er, og that's it. Tað gevur Gestum stórt tónleikaligt trúvirði, og innihaldið í tónleikinum er dygdargott og flýtur omaná, tá ið verðin druknar.

### Headache fall

Ein annar bólkur, sum frammanundan var mettur sum favorittur hetta kvøldið, var Headache Blues Treo, sum er mannaður við fýra sera dugnaligum tónleikarum. Tríggir teirra hava verið virknir í fleiri ártíggjund, og teir eru virdir og kendir sum góðir tónleikarar.

Framførslan hjá Headache leygarkvøldið var ikki rættiliga á toppinum. Teir spældu væl, og tónleikurin hevði hesa ferð førkað seg eitt sindur frá tí traditionella blues-tónleikinum og yvir í meira rock – kanska á eini leið, har Pink Floyd við hvørt plagar at ferðast. Hóast hesa broyting, sum var av tí góða, manglaði framførslan hjá bólkinum eitthvørt. Teir komu ikki rættiliga til sín rætt, og framførslan hesaferð var ikki eins góð, og hon var í innleiðandi umfarinum.

### Mind's Eye er lovandi

Ungu menninir í Mind's Eye høvdu hinvegin eina framúr góða framførslu. Og hóast tónleikaligu dygdirnar ikki eru tær somu, sum hjá eitt nú Headache, so var nervin og sálin í hesi framførslu av slíkum slagi, at teir høvdu verið ein frálíkur finalubólkur.

Teir fingu áhoyrarar-fjøldina upp frá við sínum harða rocktónleiki, og hóast styrkin hjá bólkinum nevniliga er í tí ógvusliga ljóðinum, growlinum og tunga gittarljóðinum, duga teir at brúka dynamikk í tónleikinum.

Her er talan um ein frálíkan bólk, sum kann hava eina lovandi framtíð, um teir halda á fram við at menna seg, skriva sín egna tónleik og at spæla oftari, enn teir hava gjørt áðrenn Prixið.

### Fluffy Toys á rull

Rockbólkurin Fluffy Toys er sum fáur førur fyri at spæla góðan rocktónleik, har tað ikki verður hugsað um, hvat er frammi í tíðini. Teir hava kosið sær ein klassiskan stil, og hendan stílin meistrað teir til fulnar.

Bólkurin spældi sera væl leygarkvøldið, og hóast sambandið við áhoyrararnar ikki var tað sama hesaferð sum í innleiðandi umfarinum, var bólkurin kanska enn betur fyri tónleikaliga, enn hann var seinast.

Einar Joensen gekk á odda, men hann var stuðlar av tøttum og góðum samanspæli frá hinum tónleikarunum í bólkinum. Ein fragd at hoyra hendan rocktónleikin í Prixnum.

### Lawetz setti punktum

Innleiðandi umførini endaðu við poppbólkinum Lawetz, sum hevur funnið sær ein stuttligan funkutan stíl. Sangarin við tí løgna dansistevinum og ser merktu røddini fylti nógv á pallinum, og hóast hann og restin av bólkinum byrjaðu trivlandi við einum hálvvánaligum sangi, so vundu teir seg rættiliga upp og komu sum heild stak væl frá framførsluni.

Tónleikurin var melodiøsur og merktur av nógvum detaljum, sum sótu sum tær skuldu. Trombone-spælarin legði nakað serligt afturat tónleikinum, og trummuspælarin helt allatíðini góva stevinum.

Lawetz gjørdist eitt av teimum nýggju nøvnunum, sum kláraði at gera vart við seg í hesum Prixnum – eisini hóast teir ikki komu í finaluna.



*Seinasta Prix-kvøldið í Fuglafirði var gjøgnumgangandi lívligt, og enn einaferð var stori salurin á tremur við væl uppløgdum áhoyrarum.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Sigurin er finalan

Seinasta Prix-umfarið í Fuglafirði var ein hálv finala, og umfarið var eitt gott tónleikaligt upplivilsi. Fimm góðir bólkar spældu, og teir høvdu allir kunnu stilla upp í finaluni um hálvan annan mánað.

Men kjarnin í kappingini er, at nógv skulu veljast frá fyri at fáa tey fáu fegnu. Og stóri sigurin í kappingini er sjálvt finaluplássið.

Tá fáa teir seks bólkarnir ein gyltan møguleika at gera vart við seg – bæði mótvegis teimum heimligu lurtarunum og mótvegis útlendskum fakfólki.

## Eingin havnafinala

Andaligi leiðarin í bólkinum MC Hár róði tíðliga í kappingini fram undir, at ársins finalan í Prix Føroyum fór at vera ein finala við seks havnabólkum.

Hetta gjørdist tó ikki veruleiki.

Fýra av bólkunum í finaluni eru úr høvuðsstaðnum, teir eru MC Hár, Makrel, Déja Vú og Hatespeech. Hinir báðir finalubólkarnir, Braquet og Gestir, eru úr Eysturoynni.

Finalan í Prix Føroyum verður leygarkvøldið 26. apríl, og tá skal so endaligi vinnarin finast.

## GESTAHORNIÐ



*Rúni Jákupsson, útvarpsmaður*

»13 verður givið fyri framúr sjálvstøðugt og avbera gott avrik.« Soleiðis stóð á próvtalsstiganum, tá eg gekk í skúla. Hóast tað ongantíð eydnaðist at fáa 13 talið í hús, so var okkurt dragandi og gandakent við tí. Hvat krevst fyri at røkka heilt har upp?

Onkuntíð, tá eg var serliga væl nøgdur við avrikið, var tað eitt vónbrot at staðfesta, at dómur lærarans ikki samsvaraði við mínar vónir. Tá var freistandi at hugsa, at orsøkin mátti vera, at lærarin ikki skilti meg. Kanska hava luttakararnir í Prix Føroyum av og á hugsað tað sama.

Flestu bólkarnir hava vant intensivt í mánaðir í royndini at vinna sær sess í finaluni í Norðurlandahúsinum. Spenningurin hevur verið øgiligur, hvørja ferð Jákup Magnussen er komin á pallin at siga áhoyrarafjøldini endaliga úrslitið, sum teir 10 dómararnir eru vorðnir samdir um. Dómurin í brævbjálvanum hevur oftast havt eina rættiliga dramatiska reaktión við sær í salinum. Gleðisróp og vónbrot - hvørt um annað. Í onkrum umfari vórðu summi so skelkað av úrslitinum, at orðið »gøla« í heilum var at síggja á hesum ymsu kjaktorgunum. Onkur vildi vera við, at dómararnir als ikki skiltu nýggja tónleikin.

Um ein er samdur ella ikki, so skerst ikki burtur, at tað er vandamikið at skýra dómararnar inkompetentar. Prix Føroyar er ein kapping, og vit taka sjálvt grundarlagið undan kappingini, um vit ikki góðtaka teirra niðurstøðu.

Lat meg tó skunda mær at leggja aftrat, at eg ikki havi tikið undir við úrskurðinum hvørja ferð, men kortini ætli eg mær avgjørt at klappa, tá Jákup Magnussen kunnger endaliga vinnaran tann 26. apríl. Tí eitt so positivt og í allar mátar gevandi tiltak má ikki enda við einum antiklimaksi. Tað rennur kalt niður eftir bakinum, tá hugsað verður um syndarligu móttøkuna, Taxi fekk í 1999, tá manningin kom aftur á pallin at taka ímóti vinninginum. Tað má ikki henda aftur.

Í undanumførunum hava 29 bólkar framført sín tónleik. Teir hava spælt umleið 20 minuttir hvør. 580 minuttir ella næstan 10 tímar av spildurnýggjum føroyskum tónleiki. Ein steinur aftrat er lagdur í alsamt vaksandi varðan.

Tað er eisini at fegnast um, at tað longu nú er greitt, at tað ikki bara verða teir seks finalubólkarnar, ið vit fara at hoyra aftur. Millum 15 tær bestu í løtuni, eru tríggir Prix-bólkar. Eingin teirra verður í finaluni, men hóast tað hava fólk tikið tónleikin til sín. Tað sigur eitt sindur um, at Prix Føroyar hevur ein marglætis trupulleika at dragast við. Lurtararnir vildu fegnir havt fleiri enn teir seks í finaluni.

Tað hevur verið eitt stórt privilegium at hoyrt, og í útvarpshøpi eisini hitt, allar 29 bólkarnar. Eftir mínum tykki hava verið fleiri sjálvstøðug og avbera góð avrik í teimum seks umførunum.